## Stjórnin missir stuðul



Íslendingar eru ikki so væl nøgdir við stjórnarflokkarnar og teir einstøku ráðharrarnar nú sum fyri bara einum mánaði síðan. Sjálfstæðisflokkurin heldur tørn, men hin samgonguflokkurin, Samfylkingin, fær nú so lítla undirtøku sum ongantíð fyrr í hesum valskeiðinum. Samstundis siga 58 prosent, at tey eru nøgd við stjórnina. Tað søgdu 68 prosent fyri einum mánað síðani, og hesa tíðina er umdømið hjá fleiri ráðharrum versnað, skrivar Vísir.

## Kirkjukonsert á Tvøroyri

Í annaðkvøld, leygarkvøldið kl 19, verður konsert í Tvøroyar kirkju í sambandið við 100 ára haldið. Tey sum spæla eru, Ungdómsorkestrið hjá Musikkskúlanum, Tvøroyar Hornorkestur, Jens Mortan Mortensen á orgul, Mia Káradóttir floytu, Bjarni Berg, klarinett Oddur Hentze klarinett og Birgitte Schakenburg á flygil. Framført verður hátíðartónleikur - lættur og klassikur tónleikur so sum Bach, Telemann, Mendelsohn og Crusell. Ungdómsorkestrið spælir eitt kent preludium úr Te Deum og kenda svenska sálmin “En Vanlig grønskas rika drakt”. Jens Mortan framførir Fuga og Preludium hjá Bach, og ein trio sum er samansett av tveimum klarinettum og klaver spæla eitt orkesturverk hjá Mendelssohn.

# Vinnumálaráðið eitt vónbrot

**- Hesuferð væntaðu vit okkum eitt gott samstarv við Vinnumálaráðið, men nú fíggjarlógaruppskotið varð borið niðan í tingið, eru vit als ikki nevnd, og tað eru vit ógvuliga vónbrotin av, sigur Rani Nolsøe, leiðari í Íverksetarahúsinum**

ÍVERKSETAN
*Leo Po1ulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Rani Nolsøe er ógvuliga vónbrotin av Vinnumálaráðnum, sum hann metir sum eina beinleiðis forðing fyri virkseminum hjá Íverksetarahúsinum*

Íverksetarahúsið í Klaksvík hevur virkað í eitt ár nú. Í fyrstu ársfrágreiðingini verður millum annað sagt:

»Í 2007 varð fyri fyrstu ferð eitt hús til íverksetar sett á stovn við tí greiða fyrsta prioriteti, at veita ítøkiliga og brúkaravinarliga ráðgeving til vinnuligar íverksetaraætlanir.

Hjá íverksetum er fyrimunurin við einum íverksetarahúsi tann, at øll ráðgeving er samlað á einum stað, og at henda ráðgeving hevur fyrsta prioritet.

Í einum hevur hetta eisini ta hepnu avleiðing fyri Íverksetarahúsið, at førleikin at veita eina topp ráðgeving, hevur allar møguleikar at styrkjast, tá tænastan er samlað á sama staði, og kjansurin at kunna arbeiða við einum kritiskum íverksetarahópi tískil er størri.

Í sama viðfangi skal nevnast, at Íverksetarahúsið er skipað við so fáum fólkum í starvi sum møguligt, og júst tí virkar sum ein opin platformur, har netverk úr vinnuni, millum royndar íverksetar og konsulentar verða brúkt eftir tørvi. Endamáli við hesi skipan er bæði at virka í tøttum samstarvi við vinnulívið, og at tryggja íverksetum, at teir altíð verða møttir við teimum spíssførleikum, sum eru tøkir í samfelagnum. Tað tryggjar sjálvandi eisini relevans og innovatión í virkseminum, sum í seinasta enda hevur avgerandi týdning fyri íverksetararnar«.

Rani Nolsøe, leiðari í Íverksetarahúsinum, hevði væntað sær so nógv av positiva andanum, sum Vinnumálaráðið hevur lagt fyri dagin. Men hann má bara staðfesta, at enn einaferð er bert talan um føgur orð.

Ikki kappast við privatar íverksetar

- Eg má bara staðfesta, at fíggjarlógaruppskotið er eitt satt vónbrot. Vinnumálaráðharrin hevur verið og vitja okkum, og tað tóktist rættuliga positivt, men nú fíggjarlógaruppskotið er lagt fram, eru vit als ikki nevnd í tí, sigur Rani Nolsøe.

Á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum førir vinnumálaráðharrin fram, at Íverksetarahúsið er eitt upplagt evni at fáa pening frá Vinnuframagrunninum, men hesum er Rani Nolsøe als ikki samdur í.

Pengarnar úr Vinnuframagrunninum skulu tey privatu iniativini hava, teir skulu ikki brúkast at byggja upp almennar og privatar stovnar. Tað, vit allatíðina hava ført fram er, at fáa okkara egnu konto á fíggjarlógini, so vit kunnu fáa Íverksetarahúsið at fungera til frama fyri føroyska íverksetan, sigur Rani Nolsøe.

Hann spyr, hvussu tað ber til, at Vinnumálaráðið ikki hevur áhuga í beinleiðis at stuðla einum initiativi, sum hevur Eik Banka og næststørstu kommunu í landinum sum høvuðsstuðlar.

- Vit hava ongan áhuga í at kappast við privatar íverksetar um pengarnar í Vinnuframagrunninum. Um politiski myndugleikin meinar nakað við íverksetan, so er tað er á fíggjarlógini, Íverksetarahúsið hoyrir heima, og ikki í kapping við privatar íverksetarar í Vinnuframagrunninum, sigur Rani Nolsøe.

# 1,6 milliardir í íløgum

**SEV hevur í kvittanum at gera íløgur fyri 1,6 milliardir krónur komandi tíggju árini. Hetta skal fíggjast við lántøku á 150 milliónir um árið í tíggju ár**

ÚTBYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Hákun Djurhuus, stjóri í SEV*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

SEV hevði umboðsnevndarfund mikudagin á Hotel Føroyum. Millum málini á fundinum var ein tíggju ára íløguætlan, sum umfatar útbygging av vatnorkuni hjá felagsskapinum í serligan mun.

- Ætlanin er at økja framleiðsluna av varandi orkukeldum úr verandi 45% upp í 55% av orkuni hjá SEV, sigur Hákun Djurhuus, stjóri.

Settar verða av fyri 1,6 milliardir krónur komandi tíggju árini, harav tær 800 millónirnar verða markaðar til víðari útbygging av vatnorkuni. Serliga trý nýggj øki eru áhugaverd í hesum sambandi, og tað er eitt øki í Vágum, eitt í Vestmanna og so serliga eitt øki í Norðurstreymoy, sunnanvert Haldórsvík.

- Hetta øki er serliga spennandi, tí tað gevur størstu framleiðsluna. Mett verður, at við hesi verkætlanini fáast góðir 41 milliónir kilowatt-tímar fyri áleið 500 milliónir krónur, sigur Hákun Djurhuus.

Hetta er eisini í samsvar við landsins politikk, at minka um $CO_2$ útlátið.

Men hóast SEV roknar við avlopi á sínum fíggjarætlanum, verður neyðugt at taka upp lán fyri at fíggja útbyggingarnar. Roknað verður við at taka 150 milliónir krónur í láni um árið komandi tíggju árini, og tað merkir, at felagið um tíggju ár fer at skylda yvir eina milliard krónur. Og tað er meir enn SEV skyldaði, tá felagið skyldaði mest seinast í 1980-unum.

Samstundis sum SEV ætlar at brúka 800 milliónir til at útbyggja vatnorkuna, eru bert settar 81 milliónir av komandi tíggju árini til at útbyggja vindorkuna.

- Tá tú tosar um vatnorkuútbygging, er talan um ein tíðarhorisont upp á eini 50-60 ár, meðan tú tosar um 10-15 ár, tá talan er um vindorkuútbygging, sigur Hákun Djurhuus.

Á umboðsnevndarfundinum mikudagin fekk stýrið eisinik heimild at stovna eitt partafelag, sum skal taka sær av allari vatnorkuframleiðslu framyvir.